

Várljóð

Heimamissiónsforlagið hevur givið út nýggja ungdómssangbók, ið nevnist Várljóð.


Fyri fýra árum síðani gav Heimamissiónini út eitt sanghefti, og ætlanin var tá, at koma við fleiri, men hendan ætlan varð slept. Ístaðin hevur verið arbeitt við eini veruligari sangbók, sum nú er komin.

Í Várljóði eru 140 sangir, sum allir eru setir upp við nótum, soleiðis at tað er lætt at læra sangirnar. Fleiri gamlir og kendir sangir eru í nýggju sangbókini, men eisini fleiri nýggir hava fingið innivist.

Heimamissiónsforlagið sigur, at fyrra sanghefti varð útselt beinanvegin, og tí hevur alla tíðina síðani hetta kom út verið tørvur á einari nýggjari útgávu. Hendan útgávan er serliga ætlað at stuðla sangin millum ungdóm innan Heimamissiónina og tað er eisini ungdómurin, sum kom við hugskotinum til bókina, og hevur eisini lagt hana til rættis.

Várljóð er prenta í Svøríki. Bókin kostar 70 krónur og fæst frá Heimamissiónini og í bókabúðum.

tór.-


98. Reinur sum kavi (B)

Ole Brattekaas / Hjørleif Poulsen
Hj.M. 377,b
Svenskur

Hugsa eg mundi, at Gud ei kundi náðh mær veita, júst sum eg var.
At skula lúta, berjast og stríða, stóð mær for eyga livandi nær.
Hart gjørdist stríð mær, mæði og neyð, og eg bert fann har mátloysi, deyð'.
Hann hevur vunnið, blóðið er runnið! Amen, halleluja!

Í øllum váða, eg tó kann fáa náði, tí Jesus freistu mær vann.
Hann mátti lúta, berjast og stríða, í fylling tíðar sigrað hann.
Reystur eg renni, hoyr mína ræði: Syndin er sinkað, sálin er grødd.
Guð hitt mær sigur, at nú er friður! Amen, halleluja!

Nótar eru prentaðir til allar sangirnar í bókini

Sjálvandi vóru øll menningartarnað vælkomin umborð

- men ivaleyst er ein misskiljing komin fyri, soleiðis at nøkur teirra stóðu eftir á bryggjuni tá Norrøna fór útferð, sigur óli Simonsen, formaður fyri føroysku NFPU-nevndini.


Óli Simonsen: Sjálvandi vóru tey menningartarnaðu serliga vælkomin við á rundferð, og eg eri sera harmur um at onkur misskiljing er komin fyri. Men vit fara at royna at gera tað gott aftur. Mynd: Kalmar

Í Sosialinum leygardagin søgdu starvsfólk á Eirargarði seg vera ógvuliga misnøgd við, at ikki øll evnaveik fingu møguleika at koma á rundferð við Norrønu. Talan var um menningartarnað, sum høvdu verið við í sjónleiki í samband við stevnuna, og sum vóru komin oman á bryggjuna fyri at koma við skipinum. Men hesum fingu tey ikki loyvi til.

-Eg visti ikki av nøkrum, fyrr enn eg las hetta í Sosialinum leygardagin, og fór beinanvegin at kanna eftir, hvat hent var. Tí ein misskiljing mátti tað vera, tí sjálvandi hevur eingin av fyrireikarunum nakað sum helst ímóti, at øll tey menningartarnaðu, sum høvdu hug at vera við á rundferðini við Norrønu, fingu møguleikan.

Hetta sigur Óli Simonsen, formaður í føroysku NFPU-nevndini og harvið ein av høvuðsfyrireikarunum av stevnuni.

-Vit gjørdu alt fyri at tey menningartarnaðu sjálvi fingu høvi at vera við so nógv sum á nakran hátt gjørligt, og hetta eydnaðist eisini rættiliga væl. Hetta er eisini fyrstu ferð, at tey menningartarnaðu hava verið so nógv við á nakrari NFPU-stevnu. Bæði sum fyrilestrahaldarar, stevnuluttakarar og ikki minst í teimum mongu mentannarligu tiltøkunum, og tí er tað serliga hugstoytt at fáa tílíkt at vita nú stevnan er av, sigur Óli Simonsen, og harmast um hendingina á bryggjuni mikudagin. Ikki minst tí her vóru fólk, sum aktivt høvdu tikið lut í stevnuni.

Hann heldur, at her er hend ein misskiljing av onkrum slag. Kanska hava hesi verið heldur sein oman á bryggjuna. Men tílíkt kann henda, ikki minst tá ein hugsar um hvussu stórt tiltakið var.

-Men vit vilja gera okkurt fyri at bøta um mistakið. Vit vilja bjóða hesum fólkum til eina samkomu av einum ella øðrum slag og fara helst eisini at taka sjónleikirnar uppaftur í heyst, sigur Óli Simonsen.

Fínasta veður heimaftur

Útlendsku gestirnir eru annars komnir heimaftur í øllum góðum. Nógv tey flestu fóru við Norrønu. Fleiri enn 500.

Óli Simonsen letur heilsa frá dananum Ole Hansen, blaðstjóra á NFPU-blaðnum, og sum fór heim aftur við Norrønu.

Alt gekk væl og øll vóru samd um hvussu væl alt hevði gingist, og hvat tey høvdu fingið burturúr. Umborð á Norrønu tóktist fólk eisini at taka boðskapin frá stevnuni í fullum álvara.

-Einki var óført tá fyrilit skuldi takast. Øll hjálptu øllum. Hevði onkur, sum ikki var so væl fyri, fingið eitt kamar, sum lá eitt sindur óhøgligt fyri, vóru tað beinanvegin fleiri, sum vildu býta um. Og lagið var gott og dýrd í sjónum, visti Ole Hansen at siga frá. Hann lat heilsa øllum í Føroyum, sum á ein ella annan hátt høvdu havt við stevnuna at gera.

tór.-

Felagið Javni gavst ikki so um stevnan var av. Í góðveðrinum settu tey upp sølubás uttan fyri skrivstovuna í N. Finsensgøtu, har tey seldu ymiskt frá stevnuni. Mynd: Tórfinn

